# Føroya Sparikassi tódnar

**Fríggjadagin lat Føroya Sparikassi fimm deildir ymsastaðni í landinum aftur. Ein av bygningunum er longu seldur**



*Rúni Olsen steingir Føroya Sparikassa í Sandavági fyri seinastu ferð*

*Mynd: Edvard Joensen*

TÆNASTA
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

**Sandavági:** Fríggjadagur tann trettandi var dagurin, tá Føroya Sparikassi valdi at lata fimm deildir aftur ymsastaðni í landinum.

Tað vóru deildirnar í Skopun, Sandavági, Kvívík, Hósvík og á Skála, sum latnar vórðu aftur hendan dagin.

Í Sandavági kennist tað serliga svárt hjá nógvum fólki, at Sparikassin nú lat aftur, tí stutt er síðan, at Føroya Banki í bygdini eisini varð stongdur. So í løtuni er eingin peningastovnur í Sandavági, og tey, sum ørindi hava í slíkum, noyðast til Miðvágs, har næstu banka- og sparikassadeildirnar eru.

Tó hevur Føroya Banki eina sonevnda brævaloysn, har fólk kunnu fara á posthúsið og avgreiða síni bankaviðurskifti.

Men fólk í Sandavági, sum Sosialurin hevur tosað við, halda ikki, at tað er nøkur framtíðarloysn, tí hóast tað enn ikki er váttað, ganga seiglívað tíðindi um, at posthúsið í Sandavági eisini fer at lata aftur, og so kann tað gera tað sama at fara at fáa sær eina nýggja tænastu har, sum tey kortini missa, halda eitt sigur mótfallin sandavágsfólk fyri.

Tey seta nú sítt álit á, at Norðoya Sparikassi, sum hevur víst áhuga fyri at lata upp deild í Sandavági, fer at gera álvara av hesi ætlan, verður sagt í Sandavági.

Eisini í Skopun kennist tað sárt at siga Sparikassanum farvæl, siga skopuningar. Har er loysnin nú at fara Heim á Sand, um ein skal gera ørindi í tí peningastovninum.

Føroya Sparikassi hevur selt bygningi, sum deildin á Skála helt til í, til Runavíkar- og Skála komunur, sum ætla at brúka hann til heilsumiðstøð.

Í bygninginum hevur umframt Sparikassan eisini læknin hildið til. Men nú kommunurnar eiga bygningin, kann hann allur, sum hann er, brúkast til heilsumiðstøð burturav. Eitt nú er møguleiki fyri bæði fysioterapi, ergoterapi og øðrum tilboðum av heilsuligum slagi.

Sum partur av avtaluni millum kommunurnar og Føroya Sparikassa er avrátt, at sjálvtøkan, sum er í bygninginum, famvegis verður standandi.

# Ferðavinnan roynir nýggjar marknaðir

**Á ferðavinnumessu í Reykjavík herfyri, vístu russar Føroyum stóran áhuga. Hetta er sera spennandi og nýggjur marknaður fyri okkum, sigur sølustjórin hjá Atlantsflogi**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*



*Føroysku luttakaranir á ferðavinnustevnuni »Mid Atlantic Seminar and Workshop«, sum varð hildin í Reykjavík í døgunum fimta til sjeynda februar*

Fyrr í hesum mánaðinum var ferðavinnustevna hildin í Reykjavík, har fleiri føroysk ferðavinnufeløg vóru umboðað. Serliga áhugavert var, at russar og baltar vístu Føroyum stóran áhuga, sigur Kent Christensen, sølustjóri hjá Atlantic Airways.

»Mid Atlantic Seminar and Workshop«, sum stevnan nevndist, varð hildin í Reykjavík við Icelandair sum fyriskipara. Úr Føroyum vóru níggju luttakarar frá átta ymsum fyritøkum við.

Kent Christensen, sølustjóri hjá Atlantsflogi sigur, at serliga áhugin frá russum, baltum og amerikanarum var sjónligur á hesi stevnuni.

– Russiski marknaðurin er heilt nýggjur fyri okkum, sigur hann, og teir vístu serliga áhuga fyri føroyskari mentan. Hetta er spennandi umráði, sum vit gleða okkum nógv til at arbeiða víðari við.

Tað vórðu ongar beinleiðis avtalur sum so gjørdar á hesi stevnuni. Keyparnir, sum vóru fleiri enn 500 í tali úr 15 ymiskum tjóðum, spurdu seg fyri og fingu tilfar og upplýsingar um, hvat Føroyar sum ferðamannaland hava at bjóða, sigur Kent Christensen. Síðan fara tey so heim aftur at fortelja sínum kundum heima hjá sær sjálvum, hvat tey hava fingið burturúr. Eftir tað er tað so upp til tann einstaka ferðamannin at gera av heima hjá sær sjálvum, um tilboðini frá føroysku ferðavinnuni eru nóg lokkandi til, at tey hava hug at koma hendanveg at ferðast.

Hendan stevnan, »Mid Atlantic Seminar and Workshop«, er afturvenandi tiltak, sum Icelandair í ár skipaði fyri á tólvta sinni, greiðir Kent Christensen frá.

Amerikanarar hava føroyingar fyrr verið í sambandi við í ferðavinnuhøpi. Men tað tykist, sum teir eru meira og meira hugaðir at leita hendanveg. Kanska serliga eftir ógvusligu hendingarnar í USA tann 11. september 2001 eru teir farnir at leita sær eftir friðaligari ferðavinnuumráðum.

Baltisku londini eru eins og Russland eisini nýggj og spennandi umráði, sigur Kent Christensen.

Hann sigur, at á stevnuni í Reykjavík í ár varð eisini avtala gjørd við Icelandair í USA um at vera umboð hjá Atlantic Airways í USA og marknaðarføra Føroyar tann vegin.

Icelandair hevur sína amerikansku høvuðsstøð í Baltimore í USA, men flýgur annars til eini fimm ella sjey ymisk støð í Amerika, sigur Kent Christensen.



# Eldsbruni í Klaksvík

**Sunnukvøldið kom ein fráboðan til Sløkkiliðið í Klaksvík, at eldur var í einum sethúsum við Kjalarvegin**



*Orsøkin til eldsbrunan sunnukvøldið er ikki staðfest, og vakthavandi væntar, at hon verður verandi ein gáta*

*Mynd: Bárður Lydersen*

LØGREGLUTÍÐINDI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Um áttatíðina sunnukvøldið fekk Sløkkiliðið eina fráboðan um eldsbruna í einum sethúsum.

Talan var tó ikki um stóran eld, men nógvur roykskaði var í húsunum. Eitt kamar og ein køkur í kjallarahæddini fingu nakað av skaða av eldi eisini.

Ongin býr í húsinum til dagligt, men eigarin plagar at vera har av og á.

Løgreglan veit ikki at siga, hvør orsøkin er til, at eldurin kyknaði. Kanningar benda á, at hann kyknaði inni í einum kamari í kjallaranum, men orsøkin er sum sagt ikki staðfest.

Ánarin hevur onkuntíð verið aftur í húsinum og kikað, men tað staðfesti kanningar hjá løgregluni, at tað kann ikki vera orsøkin til eldsbrunan sunnukvøldið.

– Tað letur til, at hetta verður verandi ein gáta, vit gera so ikki meira við tað. Skaðin var avmarkaður, so ikki verður gjørt meira, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Klaksvík.

Tað var ein ungur drongur, sum stóð og hugdi út í vindeyganum í húsinum niðan fyri, sum varnaðist eldin. Hann bar skjótt at og boðaði einum øðrum granna frá. Hesin fór niðan í húsini við eldsløkkjara, men tá hann lat kjallarahurðina upp, var ikki hugsingur um hjá honum at fara inn.

Sløkkiliðið var tá boðsent, og tað gekk ikki long tíð, so var eldurin sløktur.

Annars sigur løgreglan í Klaksvík frá einum friðarligum vikuskifti, hóast nógv fólk var í býnum. Onkur var tikin upp í býnum og inn á støðina at sova, onkur smávegis húsaófriður hevur eisini verið.

# Knallert rendi á bil

**Fríggjadagin um hálvgum tvey tíðina hendi eitt lítið ferðsluóhapp við Landssjúkrahúsið**



*Ein knallert rendi í reyvina á einum bili, sum stóð stillur við vestara gonguteigin við Landssjúkrahúsið fríggjadagin*

*Mynd: Jens K. Vang*

LØGREGLUTÍÐINDI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Ein bilur steðgaði við vestara gonguteig við Landssjúkrahúsið fríggjadagin. Bilurin bleiv árendur av einari knallert. Um tað var tí, at tað var fríggjadagur tann 13, og klokkan var 13.21, tað er ikki gott at vita.

Førarin á knallertini gav sær ikki far um, at bilurin stóð stillur, so hann rendi beint í reyvina á bilinum. Knallertførarin fekk smávegis snuddir av óhappinum, men kundi ganga sjálvur á skaðastovuna.

Vakthavandi sigur, at illgruni er um, at knallertin hevði ov nógva ferð, og løgreglan kannar nú, um knallertin er lóglig.

# Fleiri innbrot í Havn

**Fleiri innbrot hava verið í Havn um vikuskiftið. Onki er stolið, men alt týðir uppá, at brotsmenninir hava leitað eftir onkrum**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Løgreglan í Havn hevur fingið fleiri fráboðanir um innbrot ymsastaðni í býnum um vikuskiftið.

Sunnudagin komu fýra fráboðanir. Ein kom frá kommunuskúlanum, har onkur hevði verið og roynt at brotið inn í tað, sum verður kallað fru Chorhúsið.

Ein rútur var brotin í kjallaranum og ein hurð var eisini brotin upp. Síðani hava brotsmenninir roynt at sloppið sær upp á fyrstu hædd, men tað var so ikki eydnast teimum. Onki varð stolið ella oyðilagt har.

– Í hasum førinum er so talan um eina innbrotsroynd, sigur Bergleif Brimvík, leiðari fyri Kriminalpolitinum.

Ein onnur fráboðan um innbrot kom eisini frá einum lærara á Santa Frans skúlanum. Har var somuleiðis ein hurð brotin upp, og onkur hevði verið runt á skúlanum. Hurðar vóru sparkaðar inn til fleiri høli, og rótað hevði verið í hølunum.

– Her var heldur onki tekin um, at nakað var stolið, men rótaríið kann týða á, at tað varð leitað eftir onkrum, heldur Bergleif Brimvík.

Í Santa Josef barnagarðinum hevur eisini verið innbrot í vikuskiftinum. Høvuðsdyrnar vóru sparkaðar inn og somuleiðis hurðarnar inn til verkstaðin og ítrivshølið. Men heldur onki var stolið har.

Hetta kann vera eitt tekin um eina rundferð, har onki var stolið, men herverk varð framt.

Ein fráboðan kom um nátturðatíð sunnukvøldið um ein tasku, sum var stolin á Platform. Men taskan varð funnin aftur seinni á einum mannfólkawc-ið. Onki varð tikið úr henni.

Mánamorgunin um sekstíðina fekk løgreglan fráboðan um, at ein maður var í ferð við at bróta inn á Manhattan. Løgreglan fór at staðið og tók mannin, sum nú situr í varðhaldi. Hann skuldi avhoyrast, so skjótt hetta var møguligt.

# Hundar brendu inni

**Tveir hundar doyðu av roykeitran av einum eldsbruna í einum sethúsum í Havn leygarmorgunin**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Leygarmorgunin um átta tíðina fekk løgreglan í Havn eina fráboðan um eldsbruna í einum sethúsum í vesturbýnum.

Talan var um eina grýtu við kjøtsúpan í, sum var kókað turr á komfýrinum. Ongin opin eldur var, men nógvur roykur.

Fólkini lógu og svóvu í húsinum, men tey sluppu út í øllum góðum. Verri gekk hjá tveimum hundum, sum ikki doyðu av roykeitran.

Løgreglan heldur, at eldurin kann hava kyknað av, at hundarnir, sum vóru í køkinum um náttina, hava roynt at komið sær upp á borðið eftir kjøti. Í royndum teirra kunnu teir so vera komnir undir knøttarnar til plátuna, og so er grýtan kókað turr. Og hundarnir doyðu so av roykeitran.

Húsini fingu nakað av roykskaða.